# Skráseting av bygningum og støðum í Klaksvíkar Kommunu at varðveita





# Yvirlit


Yvirlit ..... 2

INNGANGUR ..... 3

Skráseting av bygningum og støðum í Klaksvíkar Kommunu at varðveita ..... 3

Kapitul 1 ..... 4

- Listi yvir støð og bygningar, sum hava havt áhuga hjá nevndini ..... 4
- Uppsalir - UP ..... 4
- Í Vági – VÁ ..... 9
- Norðoyri – NO ..... 20
- Gerðar – GE ..... 24
- Myrkjanoyri – MY ..... 31
- Strond - ST ..... 37
- Skálatoftir - SK ..... 40
- Árnafjørður – ÁR ..... 46

Kapitul 2 ..... 51

- Grótgarðar ..... 51
- Bygdagøtur og varðar ..... 51
- Vøktsur ..... 51

Kapitul 3 ..... 55

- Býarrúm – serstakar byggisamtyktir - uppskot ..... 55
- Uppbýti av økjum: ..... 61

Keldur og frásøgufólk: ..... 62

# INNGANGUR

## Skráseting av bygningum og støðum í Klaksvíkar Kommunu at varðveita

Bólkurin, sum varð settur at dagføra varðveitingarlistan frá 1987, sendir her tað tilfar um bygningar og støð, sum vit í okkara arbeiði hava skrásett sum áhugavert til varðveitingar fyri eftirtíðina. Talan er um henda bókling og korttilfar við talmerkingum svarandi til ta, í hesum hefti vístu talmerking. Tilfarið er eisini teldutøkt.

Arbeiðið við at gera hesa skráseting fór í gongd eftir, at Jógvan Ravnsfjall, savnsleiðari á Norðoya Fornminnasavni í brævi - dagfest 8. juli 2010 - frá Klaksvíkar kommunu, varð biðin um at skipa arbeiðið við at dagføra varðveitingarlistan, ið varð latin kommununi í 1987.
Málið um at varðveita listan varð tikið upp í Klaksvíkar Kommunu eftir, at Óluva Klettskarð, býráðslimur, hevði skotið upp at fáa endurskoðað og dagført varðveitingarlistan frá 1987, tí hesin kundi verið hentur hjá kommununi í komandi útbygging, ásannandi at fleiri sermerktir bygningar og støð, ið kundu verðið varðveitt, vóru nú burtur, uttan at gáað varð um tað, tá ið útbygt varð í býnum.

● ● ●

Setningurin hjá Varðveitingarbólkinum var fyrst og fremst at skráseta og gera tilráðingar um bygningar og støð í Klaksvíkar Kommunu, sum bólkurin metir áhugaverd.
Bólkurin hevur gingið kanningartúrar runt í kommununi og á hesum túrum góvu vit okkum eisini far um náttúruumhvørvið, bæði í bygdum og óbygdum øki, sjálvt um hetta ikki beinleiðis var okkara setningur. Hesi viðurskifti eru ikki – ella bert leysliga - lýst í álitinum.
Nógvir húsaeigarar hava tíbetur hug at fríðka rundan um húsini við trøum og runnum. Eisini eru býlingar við gomlum urtagørðum við lutfalsliga høgum trøum, sum eru livistøð hjá smáfuglum. Hesin vøkstur er eitt prýði nógvastaðni og gevur eitt fjálgari veðurlag. Kommunali myndugleikin átti at gjørt meira við at planta trø á opnum støðum so sum á parkeringsplássum og túnum, tí fleiri staðni hava vit óunniligar asfaltfløtur við nógvum gjóstri.
Í álitinum er spurningurin um náttúruvirði í óbygdum heldur ikki tikin við. Tað er at gleðast um, at vit eiga rík og í summum førum serstøk náttúruøki, sum mugu verjast. – Ein arbeiðsbólkur átti at verðið mannaður, sum kundi skrásett og gjørt tilráðingar um omanfyrinevndu týdningarmiklu viðurskifti.

● ● ●

Fundarfrásøgn er gjørd frá hvørjum fundi.

Umframt undirritaðu hevur Jákup Pauli Johannesen, arkitektur verið við ein part av tíðini - hann segði seg seinni úr bólkinum.

Klaksvíkar býráð verður nú at taka støðu til tað, ið varðveitast skal, við fyriliggjandi tilfari sum grundarlagi.

Klaksvík tann / - 2014

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Ravnsfjall | Finn Kjølbro | Anna Katrin Matras |
| Edward Fuglø | Kári Purkhús | Gunnleyg K. Dánjalsson |

## Kapitul 1

# Listi yvir støð og bygningar, sum hava havt áhuga hjá nevndini

Bólkurin mælir til, at bygningar/støð – merkt við reyðlitaðari markering - verða varðveitt, og at annars øll – í listanum - nevndu bygningar/støð verða handfarin við varsemi og virðing fyri upprunanum. - Friðaðir bygningar, toftir og støð eru merkt við "FM" og litað grøn.

## Uppsalir - UP

**UP 01 Grindastígur** (1)

Har varð glaðað til útróðrarbátar, tá ið grindaboð vóru.

**UP 02 Toft við Taravík** FM nr. 8416 (2)

Óviss toft beint niðan av Taravíkstanganum. Toftin er friðað sambært lóg frá 1948.

**UP 03 Rættin í Taravík** (3)

Gomul rætt innan fyri Taravíkstangan.

**UP 04 Toft á Neytadalsennið undir Ytstugjógv** FM nr. 8415 (4)

Gomul toft, sum varð brúkt sum goymslustað, tá ið ófriðaskip vóru á Klaksvík. Toftin er friðað sambært lóg frá 1948.

**UP 05 Steinur Karl Hans** (5)

Hesin steinur hevur navn eftir fútaskrivaranum Karl Hans Høffner, ið eftir søgnini varð funnin deyður við hendan steinin.

**UP 06 Sólsteinur** (6)

Sólarmerki fyri Gerðar. Kann eisini hava verið sólarmerki fyri búsetingina Niðri í Toftum. – Verður varðveittur.

**UP 07 Toftir úti á Trøð** FM nr. 8419 (7)

Ein stór toft og onkrar minni beint uttanfyri bøgarðin á Uppsølum, uttanfyri tunnilsmunnan til Norðoyatunnilin. -Toftin er friðað sambært lóg frá 1948.

**UP 08 Nónhamar** (10)

Stórur hamari upp suður frá Brúnaskarði. Sólarmerki fyri Uppsalar og Gerðar, (uppi á Grundum).

**UP 09 Niðri í Toftum** FM nr. 8409 (17)

Her varð útgrivið uml. 1970 og seinni í tveimum umførum, har gamlar toftir komu til sjóndar. Búseting hevur verið har í víkingatíð og miðøldini. Rannsóknin er ikki liðug, og eru fleiri toftir rundanum har, sum rannsóknin var. Toftirnar friðaðar sambært lóg frá 1948.

**UP 10 Uppsalir** FM nr. 8402 (18)

Hesin var fólkaríkasti býlingur í sóknini . Roknast kann við, at býlingurin er frá miðøldini, og eru bústaðarleivdirnar her friðaðar sambært lóg frá 1948.
Búsetingin á Uppsølum var í fyrstani avmarkað til millum áirnar báðar Matarána og Brunnin.



*FDS-kort*

**UP 11 Hornkeldan** (19)

Áðrenn kommunan yvirtók vatnveitingina vóru vatnfeløgini privat. - Gomul søgn er, at vatnið úr Hornkelduni, t.e. keldan omanfyri Stovugarðshúsini, veitir heilsubót, og at tey, ið drekka av henni, liva longur enn onnur fólk.
Mælt verður til, at Hornkeldan verður varðveitt.

**UP 12 Støðusteinur** (20)

Vatn skal altíð standa á hesum steininum, verður sagt. Hann stóð uppi í Horni, men tá rættin har var uppfylt í 1980´unum, var hann fluttur til ta nýggju rættina úti í Horni.

**UP 13 Húsini hjá Niklas á Uppsølum** (22)

Hesi húsini bygdi Niklas uml. 1907. Tey hava roykstovu og hoyggjhús í sunnara enda, og eru bygd við tilfari úr Antineshúsi, har nakað var frá Royndini Fríðu. Ein sperra í hoyggjhúsinum er frá Royndini.
Dømi um hús hjá útróðrarmanni, sum samstundis var ognarmaður.
Eiga at handfarast við virðing fyri upprunaútsjóndini





**UP 14 Húsini hjá Barbu** (23)

Húsini á Tjaldrafløtti eru bygd í 1898 og útbygd fyrst í 1990´unum við virðing fyri upprunastílinum.

**UP 15 Húsini í Trøllagili** (24)

Tann norðari endin er bygdur í 1873-74 og tann sunnari uml. 1910. Stovan í norðara enda hevur beran bróstavið enn sum tá. Í hesi stovuni lærdu steinabrøðurnir menn í Norðoyggjum siglingarlæru.
Aftaná 1987 er húsini útbygt og broytt.



**UP 16 Húsini hjá Tamar Samson** (25)

Húsini eru bygd í 1873. Seinni læt Oyrar-Jens eina stovu byggja afturat norðureftir. Norðari endi er laðaður upp og gjørdur á sama hátt sum Gamli Skúlin. Undantikið kvistin niðaneftir eru húsini lítið broytt, síðan tey vórðu bygd. – Vindeyguni er skift í 1980 árunum.



**UP 17 Húsini hjá Gøtu-Jóhan og Óla hjá Gretu** (27)

Húsini hjá Gøtu-Jóhan eru bygd í 1881, og sonurin Óli bygdi fast í suðurendan uml. 1914. Bæði húsini lýsa væl føroyskan byggihátt hvørju megin 1900. Eftir kríggið er ein betongbygningur – sethúsini hjá Jógvan Johansen - bygdur uppí sunnara enda.
Arkitektoniskt hvør sín typa – umfavna ikki hvørja aðra, umboða stilt men talandi hvør sína tíð.
Bólkurin mælir til, at húsini saman við búðarhjallinum vestanfyri verða varðveitt.
Búðarhjallar eru vanligast í Norðoyggjum og í Eysturoynni.





## UP 18 Gamla Spinnaríið





Bygningurin er frá uml. 1944.
Ullvirkið var í nýtslu árini 1944-1964. Á loftinum var fiskaturkarí frá 1954 og nøkur ár fram.
Undir krígnum vórðu takflísar – reyðar á liti – stoyptar í bygninginum. Takflísarnar vórðu brúktar til Spinnaríið, skrivstovuna hjá Kjølbro á Stongunum og fjósið hjá Kjølbro.
Mælt verður til, at upprunabygningurin verður varðveittur so upprunaligur sum til ber, men bólkurin setir seg tó ikki í móti møguligum útbyggingum.



*Lænt úr heftinum hjá Grunnurin Spinnaríið*




*Lænt úr heftinum hjá Grunnurin Spinnaríið*



**UP 19 Barkhellan í Stovugarðinum**

Er varðveitt í økinum niðanfyri Stovugarðin.



**UP 20 Trappusteinurin í Køkinum**

Er varðveittur í urtagarðinum hjá Petur Andreassen

–

**UP 21 Kráaøki, húsatoftir, ból, garðløg v.m.**

Víst verður til skráseting av fornminnum runt Borðoyarvík, Norðoya Fornminnasavn 2006.

Her m.a.:

UP 22: Kráarøkið í Keldum

UP 23: Kráarøkið í Hálgadali

Up 24:Toftir á Byrgishamri úti í Keldum

UP 25:Toftir og garðløg undir og á Hamrinum og úteftir

UP 26: Alt økið frá Flesjum og út til bátahylin

---- ----- -----

**GG**!

Uppskot um býarrúm, serstaka byggisamtykt, bøgarðar o.a. í UP-økinum – sí kap. 2 og 3

## Í Vági – VÁ

**<u>VÁ 01 Í Vági</u>** FM nr. 8401 (29)



Hetta er gamal býlingur, og í søguligari tíð hevur vártingið í Norðoyggjum verið hildið í hesum býlinginum.
Her var eisini tann einasta kirkjan í sóknini. Tann seinasta stóð uppi til 1868, men kirkjugarðurin stendur enn.
Undir krígnum varð ein minnisvarði reistur í kirkjugarðinum.
Bústaðarleivdirnar, kirkjutoftirnar og kirkjugarðurin eru friðað sambært lóg frá 1948.

**<u>VÁ 02 Yviri á Grundum</u>** FM nr. 8411 (30)

Her skulu eftir søgnini bústaðarleivdir vera, og tá ið vegurin varð gjørdur millum Biskupsstøð og Vág tætt við, komu teir niður á steinsetta flá. Kemur undir friðing.

**<u>VÁ 03 Christianskirkjan</u>** <u>(31)</u>



Er bygd í 1963 í gomlum norrønum sniði.
Mælt verður til, at kirkjan og tornið verður varðveitt í uppruna-útsjónd.

**<u>VÁ 04 Hvíthús</u>** <u>(34)</u>



Eru bygd í 1909 og seinni lyft upp einar tvær formahæddir. Her hevur verið bæði hotell, kafé, handil v.m. - Útsjóndin er ikki nógv broytt í mun til ta upprunaligu.
Húsini eru bygd í sweizarastíli, men eru nýliga kløddd við Føroyaprofil. Mælt verður til, at húsini verða viðgjørd við virðing fyri upprunasniði og útsjónd.

**<u>VÁ 05 Húsini hjá Jóan Paula og Poul Johannes í Horni</u>** <u>(35)</u>



Húsini eru samanbygd. Jóan Pauli byggir í 1884, og sonurin Poul Johannes byggir uppí heimanfyri seinni.

**VÁ 06 Sethúsini í Lávíkum** (36)

Absalon á Trøllanesi bygdi hesi húsini í 1868 til handilin úti í Klaksvík. Hesi munnu vera fyrstu hús í Klaksvík við trimpli.

Mælt verður til, at møguligar broytingar við húsunum verða framdar við virðing fyri uppruna byggistílinum.



**VÁ 07 í Búðunum FM nr. 8412** (37)

Søgn er um, at hállendingar hava havt búðir her. Nú sæst einki til, at nakað hevur verið har, tí allastaðni er bygt.

**VÁ 08 Húsini hjá Jústa-Pól** (38)

Bygd úr Primusarviði (lastin av skipinum Primus, sum fórst í 1875) og vísa eini traðar- og útróðrarmannahús frá 1878. Húsini vóru fyrr áføst við eini minni hús uttanfyri. Í 1921 var bygt niðanúr og seinni kamar gjørt á loftinum.

Mælt verður til, at húsini verða varðveitt.



**VÁ 09 Handilshúsini úti í Klaksvík FM nr. 8408 (39)**

Sum fyrsti handil í Norðoyggjum varð ein bygningur reistur her í 1838, og seinni er so meira bygt afturat. Norðoya Fornminnasavn eigur bygningin og rekur savn her.

Bygningurin er friðaður sambært lóg frá 1948.

Sunnanfyri handilshúsini stendur pylsuvognur. Hendan staðseting er ikki hóskandi til ein pylsuvogni tá um útsjónd ræður, men ikki minni vegna eldsváða, og heitir bólkurin staðiliga á býráðið um at skipa so fyri, at hann verður fluttur á annað stað.





**VÁ 10** **Havnarskrivstovan FM nr. 8408** (40)



Er bygt í 1873. Uml. 1920 varð bygningurin lyftur upp og longdur. Upprunaliga nýtslan var ráfiskahús og á loftinum vóru bøkjarar.
Seinni er húsið brúkt til mangt og hvat, t.d. politistøð, havnarskrivstovu, tollbúð v.m. - Í dag húsast "Parlamentið" í húsinum. Eigur at verða varðveitt í samband við handilshúsini úti í Klaksvík.
Fyri at fáa húsið so nær upprunaútsjónd sum gjørligt, verður mælt til, at vindeyguni verða skift út til sprossavindeygu líkt upprunanum.

**VÁ 11** **Sethúsini úti í Klaksvík FM nr. 8408**



"Faktorshúsini" vórðu bygd sum sethús til handilin í 1838. Seinni er bygt uppí heimeftir og ovara síða er lyft upp. Bygningurin er friðaður sambært lóg frá 1948. – Húsini verða nú sett í stand, sum tey sóu út uml. 1930.

**VÁ 12** **Húsini hjá Elsu Klein**



Helst tey elstu sethúsini niðanfyri Selheygg. Omanfyri vegin stóðu eldri hús, men hesi eru tikin niður.
Mælt verður til, at møgulig út- um- ella nýbygging verður framd við virðing fyri upprunastílinum.

**VÁ 13  Hjallur omanfyri gomlu politistøðina**

Hjallurin er forfallin og eigur at vera settur í stand - málaður svartur við flagtaki  - og varðveittur.



**VÁ 14  Gomlu læknahúsini**

Bæði húsini  og urtagarðurin eiga at vera sett í stand og  varðveitt sum eitt sjónligt dømi um upprunan til Klaksvíkar Sjúkrahús.

Grótgarðurin niðanfyri sjúkrahúsið – sunnanfyri Sniðgøtu oman móti Klaksvíksvegnum – er gjørdur úr gróti frá m.a. Gerðaneystinum á Biskupsstøð.





**VÁ 15   Sethúsini í Grótinum**

Mælt verður til, at  møgulig út- um-ella nýbygging av vælhildnu sethúsunum verður framd við virðing fyri upprunastílinum.



**VÁ 16 Serligur byggistílur frá 1950´unum**

Mælt verður til, at møgulig út- um- ella nýbygging av vælhildnu sethúsunum verður framd við virðing fyri upprunastílinum.



**VÁ 17 Ídni**

Niðara síðan við sermerktu vindeygunum umboðar serliga smiðjuútsjónd frá tíðini, hann varð bygdur (1947). Bólkurin er greiður yvir kommunalu ætlanirnar at burturbeina bygningin, men vísir hinvegin á møguleikan at samansjóða hann við umhvørvið – sum er Faktorshúsini, Havnaskrivstovan, gomlu handilshúsini og ætlanir um torg - og at gagnnýta hann til hóskandi virksemi.



**VÁ 18 Gamla Politistøðin**

Upprunaliga bygd sum sýslumanshús við posthúsi (í 1911). Frá 1928 vórðu húsini nýtt til postavgreiðslu burturav.
Í 1947 vóru húsini umbygt.
Løgreglan flutti inn í 1967 og helt til í bygninginum, inntil hon flutti í nýggjan bygning á Sandinum.
Við tíðini hevur bygningurin havt ymiskar litir. Bólkurin heldur ikki, at nýggja glaspartíið norðureftir hóskar til bygningin.



**VÁ 19 Sýslumanshúsini**

Bygd sum embætishús í 1928 og seinni útbygd . – Síðani 1992 hava húsini verið ogn hjá listamanninum Edward Fugløy. Urtagarðurin er frá 1999 og í 2009 læt hann byggja atelier norðanfyri húsini. Húsini verða í løtuni umvæld í sweizara-stíl (mynd 2 frá 5. nov. 2014)





Mynd 2

**VÁ 20  Húsini hjá Olaf Bjartalíð**

Húsini hjá Olaf Bjartalíð, bygd miðskeiðis í 1950´unum.
Hugnaliga ognin er vorðin ímynd av umhvørvinum í Vágstúni, og eiga møguligar um- ella útbyggingar at verða framdar varisliga og í best møguligum samljóði við uppruna-útsjóndina.



**VÁ 21  Handilsbygningurin hjá Michael Jacobsen (Kal)**

Er bygdur uml. 1938. Uttan er bygningurin mestsum onki broyttur. Bólkurin mælir til, at bygningurin verður varðveittur út frá tí sjónarmiði, at hann er:
Tignarligur, einfaldur, upprunaligur og væl umboðandi sína tíð.



**VÁ 22   Posthúsið**

Bygt í 1964-66 sum posthús, og er ein ímynd av knútapunktinum í miðbýnum. Mælt verður til at varðveita yvirskipaða arkitektoniska stílin.



**VÁ 23 Apotekið**

Bygt sum apotek í 1961. Mælt verður til at varðveita yvirskipaða arkitektoniska stílin.





**VÁ 24 Handilin hjá Óla í Skúla:**

Húsini eru bygd í 1904 og útbygd í fleiri byggistigum. Á myndum frá 1911 síggjast øll húsini. Mælt verður til, at bygningurin verður handfarin við virðing fyri upprunaútsjóndini.

**VÁ 25 Húsini hjá Hans Waag Jacobsen**



Sunnari parturin er eini vanlig føroysk sethús bygt fyrst í 1900 árunum. Seinni – helst aftaná kríggið - eru húsini útbygt, til tað tey eru í dag. Arkitektoniskt er serliga norðari parturin áhugaverdur. – Samstundis heldur bólkurin, at staðsetingin mitt í býnum við stóra urtagarðinum út móti høvuðsvegnum ger ognina serliga áhugaverda í býarumhvørvinum til t.d. alment móttøkuhús ella líknandi.
Tað mest áhugaverda við ognini, eru trøini í urtagarðinum – Verða húsini tikin niður til frama fyri aðra bygging, mælir bólkurin til, at nýbyggingin tekur atlit til hesi viðurskifti.

**VÁ 26 Seglhúsið – eldri og nýggjari bygningurin**

Bygningarnir fortelja part av vinnulívssøguni í Klaksvík. Eldra húsið, sum tá myndin var tikin í 2011, kravdi munandi ábøtur, er nú sett í stand. Bólkurin fegnast um, at arbeiðið er gjørt við virðing fyri upprunabygninginum.







*Nýggj mynd av seglhúsinum (5. nov. 2014)*

**VÁ 27 Sethús og fyrsta bryggjaríið**

Sethúsini er broytt í mun til uppruna-byggingina.

Mælt verður til, at ognirnar verða varðveittar í tann mun tær lýsa søguliga upprunan.



**VÁ 28 Toft í Rytudali** FM nr. 8417 (8)

Í hesari toftini goymdu fólk seg, tá ið ófriðaskip vóru á Klaksvík. Toftin er friðað sambært lóg frá 1948.

**VÁ 29 Toft suðuri í Kisanum** FM nr. 8418 (9)

Ein lítil toft, óvist hvat tað hevur verið. Toftin er friðað sambært lóg frá 1948.

**VÁ 30 Stangasteinur** (11)

Steinur á Brúnaskarði, har fleygastongin varð løgd undir, tá ið teir høvdu fleygað lunda har uppi.

**VÁ 31 Hálvgafelli** (12)

Røðin, ið fellur norðeftir, er sólarmerki fyri Gerðar, (uppi á Grundum).

**VÁ 32 Vektin, Altarið** (13)

Gamalt vaktarstað, sum varð brúkt, tá ið ófriðaskip sigldu millum oyggjarnar. Sagt verður eisini, at ein stórur steinur vestanfyri Hálvgafelli er Vektin.

Her er eisini staðið Altarið, har maður, sum var dømdur frá lívinum, kundi fáa grið, um hann kláraði at renna hertil, áðrenn hann varð fangaður.

Tætt eystanfyri Altarið er ein kagingarsteinur, har tað sæst oman í allar býlingarnar.

Á fløtuni omanfyri Altarið, á røðini norður av Hálvgafelli er ein stór, mestsum rund, toft, og er veggurin eystureftir meira rættur. Toftin stendur heilt vesturi á eggini og einki annað grót er á fløtuni har.

Ætlandi hevur toftin verið brúkt sum skýli ella vaktarstað.

Haðani sæst norð í Djúpini, norður gjøgnum Kalsoyarfjørð og væl suðureftir.

**VÁ 33 Háskúlatoftin** (14)

Her stóð fyrsti háskúlin í Føroyum frá 1900 til 1909. Kemur undir friðing. Verður varðveitt sum eitt minni um tann fyrsta fólkaháskúlan í Føroyum, ið var her frá 1900 til 1909.

**VÁ 34 Yviri á Grevstrinum** (15)

Eftir søgnini skulu sjórænarar, sum bardust sínámillum, liggja grivnir her. Túvur síggjast í lendinum.

**VÁ 35 Glaðingarstøð á Klakkinum** (16)

Omanfyri rættargarðin undir Klakki varð glaðað til Húsar um grindaboð á Borðoyarvík ella aðrastaðni.

Nakað eystari varð glaðað, tá ið bátar høvdu sett upp, ella onnur boð skuldu gevast.

**VÁ 36 Á Sand á Stongum** FM nr. 8413 (42)

Her vóru gravir, og komu leivdir til sjóndar, tá ið grivið var har uml. 1920.

**VÁ 37 Toftir undir Selheygsgøtu omanfyri kirkjuna**

Jens Pauli Joensen (Boy) hevur greitt frá, at teir komu niður á toftir, tá teir gróvu vegin beint eftir kríggið.

**VÁ 38 Klaksvíksvegur 34**



Húsið er forfallið og krevur stórar ábøtur.
Mælt verður til, at umvælingararbeiðið tekur atlit til sermerktu útstrálingina hjá upprunahúsinum. Ognin hevur verið á kommunalum hondum síðani 1986.

**VÁ 39 "Dagtilhaldið"**



Mælt verður til, at atlit verður tikið til upprunaútsjóndina av húsinum.

**VÁ 40 Stóra Bryggja**



Farið var undir byggingina av Stóru Bryggju í 1935 og varð arbeiðið liðugt í september 1937. Molin var bygdur við betongkistum, sum vóru stoyptar á landi, sjósettar og fyltar við gróti og skervi.
Partur av keiini eru tilhøgdir steinar, sum danskir steinhøggarar evnaðu til. Trappan norðanfyri liggur undir uppfyllingini.

**VÁ 41 Trappa niðanfyri Blikksmiðjuna**




Einasta sjó-trappan, sum eftir er á vestursíðuni.



**VÁ 42 Sjóvinnubankin**

Bygdur sum banki (tikin í nýtslu 1955).

Undir læknastríðnum búðu politistar í bygninginum, harafturat hevur verið læknaviðtala og gjaldsstova í húsinum, sum í dag er karmur um ungdómshús hjá Klaksvíkar Kommunu.

**VÁ 43 Føroya Banki**

Bygdur sum banki í 1966.

Í bygninginum hevur – umframt banki - verið ymiskt virksemi, s.s. handlar, skrivstovur, sjúkrakassi, læknaviðtala, íbúð v.m.

GG!
Uppskot um býarrúm, serstaka byggisamtykt, bøgarðar o.a. í VÁ-økinum – sí kap. 2 og 3

## Norðoyri – NO

**NO 01 Havið á Nærabergseggini** (43)

Hetta er eitt stórt hav, sum maður á Oyri lyfti í 1800 talinum.

**NO 02 Toftir eysturi í Hópinum** FM nr. 8303 (44)

Her eru stórar toftir, sum ikki eru gjølla rannsakaðar, og ymiskar eru meiningarnar, um hvørjar leivdir, ið har eru.

Toftirnar eru friðaðar sambært lóg frá 1948.

**NO 03 Uppi á Skansa** (45)

Møgiliga hevur her verið vaktarstað.

**NO 04 Havið við Torvadalsá** (46)

Hetta varð lyft við torvleypi á bakinum. Tað er nú brotið sundur, og óvist er, um báðir partarnir eru til.

**NO 05 Hattarsteinur** (47)

Stórur steinur úti móti Núpinum.

**NO 06 Myldurssteinur** (48)

Stórur steinur uppi við garðin út ímóti Myldursá.





**NO 07 Rættin við Myldursá** (49)

Gomul rætt, sum ikki verður brúkt longur.
Frammanundan stóð rættin við gamla bøgarðin uttanfyri Kvígarheygg og eftir hetta í Johanstrøð.
Rættin við Myldursá varð gjørd seinna part í 1800-talinum.

**NO 08 Úthúsini uttanfyri gomlu bygdina á Oyri** (50)

Her stóðu fleiri eldri úthús, - helst frá 1800 talinum.
Niðanfyri Flatnaveg eru tvey av húsunum endurreist.
Mælt verður til, at økið verður varðveitt.



**NO 09 Oyri  FM nr. 8301 (51)**



Gomul bygd við bústaðarleivdum.
Bústaðarleivdirnar eru friðaðar sambært lóg frá 1948.

**NO 10   Bønhúsgarður FM nr. 8301 (52)**

Her skal bønhúsið á Oyri hava staðið, og tá ið teir gjørdu vegin oman á Skálaberg, gróvu teir ígjøgnum og komu fram á steinseting, men enn er nógv eftir niðanfyri vegin.
Bønhúsgarðurinin er friðaður sambært lóg frá 1948.
Á økinum standa træpelar – helst til at festa jólatræið í.
Farast eigur varisliga fram á økinum.



*Bønhústoft. Mynd: Sámal Matras Kristiansen 12. oktober 2014*

**NO 11 Niðristova- Hoyggjhúsið** (53)

Upprunaliga Niðristova, og seinni hoyggjhús. Arbeitt verður við at fáa norðara enda laðaðan uppaftur, eftir at hann datt niður í vár (2014).



**NO 12 Uppistova á Oyri** (54)

Er bygt í 1897, gamalt bóndahús, men er nógv broytt uttan.

**NO 13 Spitalskhús FM nr. 8302 (55)**

Ein toft uttanfyri bøgarðin, har søgnin sigur, at fólk, sum høvdu spitalsku sjúkuna, búðu. Nakað uttanfyri er nakað, sum møguliga eru gravir eftir teimum spitalsku. Toftin er friðað sambært lóg frá 1948.

**NO 14 Grevstur við Deyðabólstein (56)**

Søgnin sigur, at fyri langari tíð síðan varð ein maður grivin her. Líkið kom rekandi upp á land beint niðanfyri.

**NO 15 Brúgv**

Brúgv tvørtur um ánna.
Bólkurin heldur brúnna vera "sjarmerandi", og áhugaverda at varðveita sum gongubrúgv.
Brúgvin er gjørd uml. 1950 við gomlu steinbrúgvunum sum fyrimynd.



**NO 16 Umboðsstovan**

Umboðsstovan stóð uppi til fyrst í seksti-árunum. Skjøldurin vendi oman og niðan, men nú síggjast bert leivdirnar eftir. Friðað sambært lóg frá 1948.



**<u>NO 17 – Gamla Geilin</u>**

Gamla geilin frá bygdini niðan um bøgarðin hómast áleið miðskeiðis á myndini. Mælt verður til at geilin verður varðveitt.



**<u>NO 18   Kráaøki, húsatoftir, ból, garðløg v.m.</u>**

Víst verður til skráseting av fornminnum runt Borðoyarvík, Norðoya Fornminnasavn 2006, m.a.:

**NO 19 :Kráaøki í Torvadali**
**NO 20 :Kráaøki í Bjargamansdali**
**NO 21 :Alt økið frá Skálanesi heim til Bergrætt**
**NO 22: Toftir í Torvadali**

# Gerðar – GE

**GE 01 Lírastovan** (57)

Tað er eitt stórt helli, sum møguliga hevur verið brúkt til skjól.

**GE 02 Toftirnar í Kvíingadali** FM nr. 8414 (58)

Niðri í Kvíingadali eru fleiri toftir. Grivið er í onkrari, og øska er funnin, eisini steinseting. Toftirnar eru friðaðar sambært lóg frá 1948. Víst verður til tilfar hjá Norðoya Fornminnasavni.

**GE 03 Havið á Kvíingaskarði** (59)

Hetta havið, sum onkur sigst hava lyft, liggur við gøtuna um skarðið.

**GE 04 Hvílingasteinur** (61)

Her settust fólk at rinda møðina.

**GE 05 Vevskúlin** (62)



Er bygdur í 1934-35, sum eini svensk hús við tilfari, sum Aina Cederblom læt til húsið eftir hina tiltiknu ferðina í Norðuratlanshavi í 1933.
Klædningurin treingir til máling, og annað viðlíkahald er somuleiðis tiltrongt. - Bólkurin heldur, at húsalitur við svenskum íblástri hevði verið vælhóskandi.
Á vegginum omaneftir hongur relief frá 1983 úr bronsu eftir Fritjof Joensen. Hetta er seinni málað brúnt! – Mælt verður staðiliga til, at tað verður reinsað fyri at fáa eyðkendu patinuna framaftur.

**GE 06 Økið í Grøv FM nr. 8410 (63)**



Her er ein stór toft, svimjihylurin frá 1906, myllutoftin, neystatoftir og rætt. Alt økið er áhugavert, og nú er brúgv aftur gjørd um Gravará, har sum tann gamla var. Toftirnar eru friðaðar sambært lóg frá 1948.
Bólkurin harmast um, at plantað er heilt oman móti tromini, og villi upprunavøksturin harvið er burtur. Mælt verður til at skapa grundarlag fyri, at villi vøksturin aftur kann sleppa framat á t.d. ávísum øki nærhendis tromina.
Tað er at fegnast um, at plantuvøksturin er skrásettur og kortlagdur á plakat eins og gjørdar eru talvur, sum vísa fuglasløg í økinum.

Bólkurin heitir á kommununa um at ansa eftir, at óvíðkomandi fremmandi lutir ikki verða settir upp í Grøvini uttan nærri grundgevingar





Mælt verður til at reinsa tann eldra svimjihylin, sum kanska er elsti svimjihylur í landinum – soleiðis at upprunahylurin aftur verður sjónligur. – Nýggjari hylurin verður ikki mettur at vera varðveitingarverdur

Bólkurin fegnast um arbeiðið, sum er gjørt uppá gróthúsið norðanfyri Grøvina, og sær virði í, at hildið verður fram við slíkum arbeiði.



**GE 07 Hellisendi**

Gamalt laðberg hjá útoyggjabátum. Niðanfrá her vóru neyst og úthús, og eisini er søgn um, at elsti bústaður í Gerðum var niðanfrá Hellisenda. Fyrrapart í 1940´unum var kavingarstabbi við tveimum lopfjalum gjørdur av ungum klaksvíkinum, sum dagliga svumu á Borðoyarvík. Nakað uttari er Torvklettur.



**GE 08** **Glaðingasteinur í Gerðum** (65)

Her var glaðað út til Oyrar, tá grindaboð vóru av Vágni.



*Mynd úr Klaksvíkar Søgu II*



**GE 09** **Uppi á Grundum** FM nr. 8403 (67)

Gamli býlingurin í Gerðum, sum varð frágingin aftaná skalvalopið í 1765.
Bústaðarleivdirnar eru friðaðar sambært lóg frá 1948.
Søgn er um, at gravstaður skal hava verið beint norð frá húsunum, norðanfyri ánna.
Minnissteinur fyri tey, ið doyðu í teimum báðum skalvalopunum, varð reistur á grundirnar í 1945.
Hann fekk nýtt støði í 2011.



**GE 10** **Brakarasteinur** (68)

Stórur steinur omanfyri toftirnar uppi á Grundum.

## GE 11 Á Gørðum

Niðristovugarðurin í Gerðum fór í tvey í 1835.
Bústaður var á hesum staði til uml. 1910.



## GE 12 Gomlu Gerðar FM nr. 8405 (70)



Her standa tey gomlu húsini og úthús eisini. Í sethúsunum hjá Adelheid og Absalon Joensen er tann sunnari parturin elsti partur av Niðristovu, meðan norðari parturin er frá 1862. Húsini hjá Andrias bónda eru frá 1914. Norðasti partur av Norðurstovu er frá uml. 1950, miðjan er frá uml. 1860 og tann sunnasti parturin er frá uml. 1910. Okkurt úthús er elligamalt, meðan onnur eru bygd eftir 1900. – Í nýggjari tíð eru framdar afturatbyggingar, sum ikki hóska økinum. Fyri sum best at tryggja upprunadámin av økinum, mælir bólkurin til, at serstøk byggisamtykt verður gjørd fyri økið sum skjótast. (sí eisini kap.3)




## GE 13 Gráisteinur (71)

Stendur á horninum: Kráargøta/ við Grástein



**GE 14 Gamli Skúlin í Klaksvík (72)**

Er gjørdur í 1892-94, laðaður av gróti á ein hátt, sum ikki var vanligt tá í tíðini.
Grótið varð flutt av Kósini til skúlan við báti og borið við leypi niðan.

Økið er berligt, og verður mælt til at planta trø – eisini við tí í huga, at upprunaliga var urtagarður frammanfyri bygningin.



**GE 15 Kirkjugarðurin á Gerðaeiði FM nr. 8407 (73)**

Her stóð kirkjan frá 1866, og partur av kirkjugarðurin er frá tíðini beint aftaná (1871).
Upprunaliga vóru kirkjugarðs-síðurnar paralellar við kirkjuna, men sum tíðin er liðin, er garðurin útbygdur fleiri ferðir til allar síður, seinastu ferð seint í 1940-unum, tá víðkanin fór fram í landnyrðingshorninum.
Grivið varð fyrstu ferð í kirkjugarðinum uml. 1871. – Bólkurin harmast um, at kirkjan varð tikin niður í 1968.
Kirkjutoftin og kirkjugarðurin eru friðað sambært lóg frá 1948.

**GE 16 Prestagarðurin á Gerðaeiði (74)**

Er bygdur í 1931 sum sethús til prestin í Klaksvík og eigur at varðveitast í sama stíli, sum tá hann varð bygdur. Er umvældur miðskeiðis í 1980unum.



**GE 17 Sethúsini hjá Kjølbro (75)**

Sethúsini eru bygd í 1924. Húsini eru umvæld miðskeiðis í 1980´unum.

Mælt verður til, at tey verða varðveitt sum minni um eini stórmanshús, og samstundis vísa eina blómandi tíð fyri Klaksvík fyrst í hesi øldini.



**GE 18 Barkhellan av Myrkjanoyri (76)**

Liggur við sunnara enda á Bókasavninum. Stóð við ta gomlu toftina á Mykjanoyri og er tað einasta, sum er eftir av gomlu búsetingini á Myrkjanoyri. Mælt verður til at varðveita barkhelluna.



**GE 19 Barkhellan í Norðurstovu**

Er varðveitt á kommunala fríøkinum eystanfyri Tekniska Skúla .



**GE 20 Barkhellan í Niðristovu**

Er varðveitt á økinum norðanfyri húsini hjá Jógvan Gerðalíð.



**GE 21 Norðoya Sparikassi**

Elsti parturin stavar frá 1928, útbygdur suður- og vestureftir í 1951. Seinasta útbygging varð framd í 1975.

**GE 22 Kráaøki, húsatoftir, ból, garðløg v.m.**

Víst verður til skráseting av fornminnum runt Borðoyarvík, Norðoya Fornminnasavn 2006, m.a.:

**GE 23**: Alt økið frá Hellisenda niðan á Grundir og úr Niðristovu í Gerðum út á Hálvgingið út á Oyrar. Hálvgingið er steinur uttanfyri kirkjugarðin í Bug - í trøðni hjá Niels Juul Arge. Har var hálvgingið á gøtuni millum Gerðar og Oyrar.

**GG!**

Uppskot um býarrúm, serstaka byggisamtykt, bøgarðar o.a. í GE-økinum – sí kap. 2 og 3

# Myrkjanoyri – MY

**MY 01 Ósasteinur** (78)

Hesin steinur stóð í ósanum, og plagdu teir fyrr at brúka hann til at meta flóð og fjøru eftir. Í 1980unum varð fylt út yvir hann, so hann sást ikki longur. – Í 2009 kom hann undan kavi aftur, tá grivið varð í økinum, og nú liggur hann í sjónum út fyri Biskupstøð. Undir flyting brotnaði eitt petti av steininum, og sum hann liggur í dag, vendir hann á "høvdinum" í mun til upprunaleguna. Bólkurin mælir til, at Ósasteinurin verður varðveittur.

**MY 02 Neyst og hjallur á Biskupsstøð** FM nr. 8406 (79)



Her er tann elligamla støðin.
Roknast kann við, at støðin er heilt gomul, eftir navninum møguliga frá katólskari tíð.
Neyst og hjallur hava staðið har í søguligari tíð. Staðið er nevnt í 1715.
Teir partar, sum í dag eru eftir av teimum gomlu bygningunum, mugu vit rokna við eru gjørdir fyrst í 1800 talinum.
Í mun til upprunaleguna vendi Jákup bóndi neystinum fyri uml. 100 árum síðani.
Neystið, hjallurin, lendið niðan móti vegnum og støðin útfrá neystinum eigur at verða varðveitt. - Tað má vera so mikið frítt rundanum, at bøur, bygningar og sjógvurin vísa, hvussu tað var við støðna. Neystið er umvælt í 1984, - fingið nýggja yvirtrom, og veggirnir partvís laðaðir uppaftur .

**MY 03 Myrkjanoyri FM nr. 8406 (81)**

Her var gamal bóndagarður, sum var frágingin fyrst í 1800-talinum.
Tá Biskupstøðbøurin var útstykkjaður í 1960-árunum, vórðu bústaðaleivdirnar ruddaðar burtur, soleiðis at onki fornfrøðiligt (undantikið barkhellan) er um Myrkjanoyragarð í dag.
(Viðv. barkhelluni - sí GE 18)

**MY 04 Húsini hjá Eliesar á Stongunum** (82)



Í hesum húsunum varð fyrsta háskúlaskeiðið hildið í Føroyum í 1899.
Húsini eru bygd í 1890 árunum. Útsjóndin er nakað broytt síðani.

**MY 05 Fiskastykkið hjá Kjølbro** (83)



Eitt av teimum fáu fiskastykkjunum, ið eftir eru. Er gjørt umaftur miðskeiðis í 1980´unum, og eigur at verða varðveitt, sum eitt minni um ta tíðina, tá saltfiskurin varð turkaður úti.

**MY 06 Krúthúsið uppi við Stórastein** (84)



Hetta varð brúkt sum krútgoymsla hjá teimum eingilsku hermonnunum undir seinna krígnum. – Er friðað sambært ásetingini um krígsminni, smb. áseting frá Mentamálaráðnum 1. mai 2009.

**MY 07 Grønaból** (87)

Her var eitt ból fyrr, men ein rætt varð laðað upp har uml. 1930. Nakað heimanfyri á bakkanum er eitt ból, sum enn stendur uppi.

**MY 08 Kellingasetur** (88)

Hetta er ein steinur, sum tey hvíldu seg á. Hann liggur við gøtuna til Árnafjarðar.

**MY 09 Samanbygd hús**



Vælhildnu húsini hjá Jóhannes á Heygnum eru samanbygd, sum fleiri onnur í bygdini, men eru mestsum óbroytt við undantak av nýggjum vindeygum og taki.

Norðari partur er frá 1897 og tann sunnari frá 1907.

**MY 10 Sethús norðanfyri Marknaveg**

Húsini, sum standa beint norðanfyri Marknaveg eru bygt á grundina hjá sethúsum Nólsoyar Páls. – Húsini er illa farin, og bólkurin sær tey ikki sum varðveitingarverd. Hinvegin hevði verið áhugavert, um ein um- ella nýbygging á økinum onkursvegna kundi víðariborið søguna við grundini.



**MY 11 Húsini hjá Magnisu**

Tað ovara av tveimum húsum framvið norðursíðuna av Marknavegi. Magnisa-lærarinna læt tey byggja í 1920 unum. – Húsini er broytt nakað við árunum við m.ø. nýggjum klædningi, vindeygum og taki, men upprunaskapið er varðveitt. – Eini sjarmerandi hús, sum bólkurin mælir til verða handfarin við virðing fyri upprunaskapinum.



**MY 12 Seinasta av trimum**

Í dag standa bert tey mittastu av einari leingju uppá 3 hús við Stangaveg, eftir.

Norðasta húsið (Jóhannes Fjallheim) var niðurtikið í samband við umlegging av vegasvinginum Stangavegur/Garðavegur, meðan tað sunnasta varð tikið niður eftir, at eldur hevði verið í. – Við bert einum av trimum eftir, verður húsið ikki mett varðveitingarvert. (Bygt í 1879)



**<u>M 13 Vælhildin hús í triðju røð frá Stangavegi</u>** (sum seinni hava fingið vegatgongd frá Skáltavegi).
Húsini eru høvuðsumvæld, við virðing fyri upprunabyggingini.



**<u>MY 14 Skrivstovu-bygningurin hjá Kjølbro</u>**.
Í dag eigur kommunan bygningin, sum hýsir Íverksetara-húsinum.
Bygningsskapið er upprunaligt, men bæði klædningur, tak og vindeygu er broytt.
Bygningurin verður nú umvældur, men bólkurin harmast um tað, sum gjørt er við takið og kvistin.



*"Gamlar myndir í Norðoyggjum" 1958*







**<u>MY 15</u>** **<u>MY 16</u>**
Skiparahúsini frá 1950-árunum kendust ofta frá øðrum orsakað av stødd og øðrvísi byggistíli.

**MY 17 Handilin á Biskupstøð**

Broytingar eru nýliga framdar á bygningin. Mælt verður annars til, at bygningurin verður varðveittur so nær uppruna-sniðnum sum møguligt.



**MY 18 Økið á Stongunum**

Bygningarnir hjá Heilsøluni, Timburhandlinum og bryggjan frammanfyri hesi eru frá nýggjari tíð. Norðanfyri er partur av gamla Klaksvíkar Hermetikk – eisini kallað "bollafabrikkin" og fyrsta flakavirkið hjá Kjølbro. Bygningurin er partur av ídnaðarsøguni á Stongunum, men er at síggja til í vánaligum standi og krevur stórar ábøtur.

Talan er um staðseting í vinnuøki, og áhugin fyri økinum til nýbygging er tí hugsandi. Bólkurin sær tó virði í at varðveita bygningin til hóskandi endamál innan vinnu ella mentan og harvið varðveita søguliga dámin av økinum.





**MY 19 Egningarskúrarnir á Stongunum**

Mælt verður til, at egningarøkið við nýggjaru skúrunum, bygdum í neystaskapi - verður varðveitt og møguliga víðkað í sama stíli.



**<u>MY 20 “Bedingin” – Stóra og Lítla beding</u>**

Umhvørvið er serligt. Vindeyguni (møguliga alt húsið) í Timbursmiðjuni eru frá hvalastøðini á Kópagørðum í Norðdepli.









# Strond - ST

**ST 01** **Strond** FM nr. 8501 (91)

Strandar bygd er so at siga órørd síðan 1908, tá ið bygdin var avtoftað. Toftirnar eftir sethúsum og úthúsum standa enn. Bøurin hevur eisini verið røktur árliga. Bústaðarleivdirnar eru friðaðar sambært lóg frá 1948. – Bygdin Strond innangarðs eigur at verða varðveitt, soleiðis at bøurin og bøgarðarnir saman við úthúsum og toftum kunnu vísa, hvussu bygdin hevur verið. Bøurin og bøgarðarnir eiga at verða hildnir við líka soleiðis, sum eigararnir koma tilsættis um, tó soleiðis, at sum mest verður varðveitt.




*Kortal.fo*





**ST 02 Rættin á Grótryggi** (92)

Rættin stendur partvís uppi enn. Hon bleiv útbygt í 1976 í sama sniði og við grótlaðing.





**ST 03 Toftir við Norðaru á** (93)

Norði á Dal eru fleiri toftir norðan fyri ánna. Óvist er hvønn uppruna hesar toftirnar hava. Ein rætt hevur einaferð í tíðini verið norðanfyri ánna. Heimanfyri ánna eru ból. Kemur undir friðing.

**ST 04 Strandaskortarnir** (94)

Helli Norði á Dal, har strandafólk fóru, tá ið ófriðaskip vóru millum oyggjarnar.

**ST 05 Nestoftir FM nr. 8502 (95)**

Her eru stórar toftir, sum partvís eru órørdar. Ivi er um, hvat her hevur verið. Toftirnar eru friðaðar sambært lóg frá 1948.

**ST 06 Skøltagarður í Ánunum**

Grindirnar høvdu fyrr stóran týdning fyri føroyingar og grindalýsi var søluvøra. Grindakúlurnar vórðu smeltaðar, og har sum smeltupottar vóru, komu grindaskøltar at rekast í fjøruni. Onkustaðni vórðu skøltarnir brúktir til girðing. Í Ánunum stendur ein slíkur garður enn niðanfyri húsini hjá Hans Hendrik Mikkelsen.



**ST 07 Neyst í Ánunum**

Neyst og gamla lendingin í Ánunum beint norðanfyri nýggja havnalagið (Norðhavnina)



## Skálatoftir - SK

**SK 01 Hálvgalandsuður** (96)

Fjallatoppur sunnanfyri Skálatoftir, sólarmerki.

**SK 02 Lynnklettur** (97)

Her var tann gamla lendingin hjá Skáltamonnum. Neystatoftir eru í økinum.



**SK 03 Skálatoftir FM nr. 8601** (98)

Bygdin innangarðs liggur órørd, síðan hon var avtoftað í 1914.
Har eru sethúsa- og úthúsatoftir, glaðingarstøð, rætt og myllutoft sunnanfyri, og garðløgini standa enn.
Bygdin eigur at verða varðveitt, sum hon er innangarðs og eisini rættin og myllutoftin sunnanfyri.





*Portrið inn í bygdina*



*Týðilig spor síggjast av trapputrinum niðanfrá bakkanum*



*Neystatoft við Kleivina*



*Jarnkongur til dragispæl á Kleivini*

***Vakra laðingin er varðveitt***



***Ítrív hjá seinastu búfólkunum er enn at síggja***



***Partur av høvuðsgøtuni***



***Rættin***



**SK 04 Lendingin í Ásugjógv** (99)

Her plagdu bátar at fara inn, tá ið teir ikki kundu leggja á sundið fyri veður. Um árhundraðskiftið varð uppgongd gjørd har og um 1930 jarnfestir at halda sær í.



**SK 05 Toftir millum Skálatoftir og Ásugjógv**

Toftir síggjast í økinum norðanfyri Skálatoftir, eins og økið er lívfrøðiliga sera áhugavert, - serliga við atliti til fuglalív og plantuvøkstur.













# Árnafjørður – ÁR

**ÁR 01 Varði á Áarskarði** (101)

Hesin varðin er stórur, og tá ið gingið verður um Áarskarð verður altíð ein steinur lagdur afturat varðanum.

**ÁR 02 Grindasteinar** (102)

Tveir steinar omanfyri Áarskarð, har rópt var grindaboð til Árnafjarðar.

**ÁR 03 Stígarnir** (103)

Her eru laðaðar trappur upp gjøgnum stígarnar og jarnfestir at halda sær í.

**ÁR 04 Hvílingasteinarnir** (104)

Teir eru á gøtuni frá Áarskarði og oman. Her plagdu tey at hvíla, tá ið tey gingu um Áarskarð.

**ÁR 05 Tingstaðurin í Køtlum** (105)

Her er tann gamli tingstaðurin hjá norðoyingum. Steinarnir standa har enn, sum teir hava gjørt í øldir. Tingstaðurin eigur at vera varðveittur, sum hann er.

**ÁR 06 Havið við Klettsendarnar** (106)

Hetta havið, ið liggur nakað frá gøtuni um Toftaskarð, hava fleiri fjallmenn lyft, og eigur tað at verða varðveitt.

**ÁR 07 Knæbursðfall** (107)

Ein fløta niðanfyri Toftaskarð, við gøtuna tá gingið verður til Árnafjarðar

**ÁR 08 Støðusteinur** (108)

Stórur steinur omanfyri Viðurbyrgið, seyðastøða er har.

**ÁR 09 Bønhúshálvmørkin** (109)

Niðast á hálvmørkini var bønhúsið í Árnafirði

**ÁR 10 Uppi á Váli** FM nr. 9001 (110)

Her skulu húsini fyrr hava staðið, áðrenn tey fluttu húsini oman móti sandinum. Bústaðarleivdirnar eru friðaðar sambært lóg frá 1948.

**ÁR 11 Líksteinur** (111)

Her varð kistan sett niðurá, tá ið lík varð borið yvir í Bø um Áarskarð til kirkjugarðin í Vági og á Gerðareiði. Berararnir hvíldu og ímynd var av, at tann deyði segði bygdini farvæl.

**ÁR 12 Minuhúsið** (112)

Varð bygt undir krígnum sum skjól hjá bygdarfólkunum at fara til, tá ið minur komu rekandi inn á Árnafjørð. Møguliga er hetta einasta minuhús í Føroyum.




**ÁR 13 Barbholið** (113)

Hol millum nakrar steinar, sum liggja saman við Stórá. Tað varð sagt fyri børnum, at gandakellingin, Barba við Kvíggjá, var inni í holinum, og tí skuldu tey ikki fara har.

**ÁR 14 Risasporið** (114)

Er í Tungá og skal vera spor av einum risa.

**ÁR 15 Kirkjan í Árnafirði** (115)

Kirkjan er bygd í 1937, er sett í stand í 1980´unum og verður nú aftur umvæld.

**ÁR 16 Dvørgasteinur** (116)

Íbygdur steinur, ið stendur vestanfyri Gerðið.

**ÁR 17 Toysafløtan** (117)

Her skuldi Toysin búgva og er ivaleyst grivin her eisini.
Hann hevði spitalska sjúku, og tí mátti hann búgva so langt frá húsum. Kemur undir friðing.



**ÁR 18 Nónsgjótan** (118)

Gjóta beint sunnanfyri Svínoyargjógv. Sólarmerki hjá árnfirðingum.

**ÁR 19 Íratoftir, Írskatoftir** (119)

Her eru toftir ella aðrar bústaðarleivdir tætt við Marknagjónna. Óvist er, hvat her hevur verið. Kemur undir friðing.

**ÁR 20 Posaklettur** (120)

Her vóru fólk sett upp á land, tey sum komu úr øðrum oyggjum.
Her er gott at koma at við báti.

**<u>ÁR 21 Í Árnafirði</u>** FM nr. 9002 (121)

Her vórðu húsini flutt oman fyri meiri enn 230 árum síðani. Bústaðarleivdirnar eru friðaðar sambært lóg frá 1948.



**<u>ÁR 22 Skúlin</u>**

Bygdur í 1904





**ÁR 23 Kirkjugarðurin**

Fyrsta lík varð grivið í kirkjugarðinum í 1929.

**Ár 24 Hálvgavestur** (100)

Soleiðis eitur Myrkjanoyrafjall í Árnafirði, og er tað sólarmerki hjá árnfirðingum.

**ÁR 25 Hjallur í Viðurbyrgi**

Dømi um hjall - bygdur í fleiri stigum.



**ÁR 26 Neyst**

Gamalt neyst í gomlu bygdini



**ÁR 27 Rest av rætt við Kráará**



**Grótgarðar i Árnafirði**





# Kapitul 2

## Grótgarðar

Har, sum grótgarðar standa uppi, verður ansað eftir, at teir verða hildnir viðlíka, og eisini í víðari úbygging at laga tað soleiðis, at sum mest av okkara grótgørðum verða varðveittir.
Nevnast kunnu t.d.:

- Garðurin framvið Vágsá sæst væl í støðum og eigur at vera varðveittur.
- Bakaði bøgarðurin á Uppsølum er kanska einasta heili bøgarðurin, sum er eftir í Klaksvík, og eigur avgjørt at verða varðveittur.
- Garðurin uttanfyri Gerðabø eigur at verða varðveittur
- Í Árnafirði eru fleiri vælhildnir grótgarðar, sum eiga at verða varðveittir. (sí síða 50)
- Garðurin omanfyri Oyrarbø stendur væl uppi enn og eigur at verða varðveittur.

## Bygdagøtur og varðar

Allar tær gomlu bygdagøturnar í sóknini eiga at verða hildnar viðlíka og somuleiðis varðarnir. Hetta er fyriskrivað í reglugerð frá 29. okt. 1940 og í bygdasavnslógini frá 9. mai 1972.



## Vøktsur

Týðiligur munur er á landslagnum, har taðað verður og ikki. Náttúrligi lyngurin víkir fyri grasvøkstri.

Sí dømi á myndini til høgru, sum vísir økið sunnanfyri Myldursá á Norðoyri.



**Trævøkstur** hugnar og fjálgar um umhvørvið. Bólkurin mælir til, at kommunan í størri mun tekur atlit fyri hesum, tá planlagt verður.

<u>Dømi 1</u>:
Ovast við Marknaveg liggja sethúsini hjá Kjølbro. Áðrenn Jørundsgøta varð gjørd suðurúr Fjósabrekku, gekk urtagarðurin hjá Kjølbro heilt oman móti markinum til prestagarðin. Trøini framvið vestaru vegsíðu eru sostatt leivdir frá urtagarðinum hjá Kjølbro.
At hava varðveitt trøini, sum ikki hava staðið í vegin fyri vegagerðini, sær bólkurin sum positivt, og mælir til, at atlit verða tikin til trævøkstur í vega- og øðrum anleggsarbeiði.
*(Klaksvíkar Kommuna hevur nú felt nøkur av trøunum – okt. 2014)*

Dømi 2:

Nýggja kommunala parkeringsøki við NólsoyarPálsgøtu er snøgt, men stórt og opið. Við nøkrum trøum plantað ymsastaðni í økinum, hevði plássið verðið bæði hugnaligari, vakrari og fjálgari.



Dømi 3:

Vælvaksin ahorntrø vestanfyri Heygaveg-suður.



Dømi 4:

Kommunan hevur nýliga grivið Stangaskákið ígjøgnum.
Bólkurin fegnast um, at trøini, sum kundu varðveitast, eru varðveitt, og at okkurt, sum mátti víkja fyri vegagerðini, nú stendur í besta blóma aðrastaðni í býnum.



Dømi 5



Ahorn *Acer* við Jørundsgøtu



Lerkur *Larix* (veksur eftir vindinum)



Dúnurt (veksur sum ókrút allastaðni)



Øsp (Populus)

Á gongutúrunum hevur bólkurin skrásett sær nógv ymisk sløg av trøum, runnum og plantum runt í býnum. Tað mesta er at fegnast um, um enn okkurt heldur var betri burturbeint. (Skøran)

Bólkurin mælir býráðnum til, so vítt sum til ber, at verja varðveitingarverdan vøkstur við t.d. at krevja góðkenning av ella loyvi til burturbeining av gomlu trøum og serligum plantuvøkstri. Byggisamtyktin krevur, at søkt verður um loyvi til niðurtøku av húsum, úthúsum o. líkn. – Bólkurin mælir til at sama skipan verður galdandi fyri niðurtøku av gomlum trøum.

Dømi 6



Kommunubrekkan er berlig. Her hevði hóskað væl við eitt sindur av trævøkstri.

**VÁ 44 Ahorntrø**

Sunnnanfyri gomlu politistøðina standa nøkur vælvaksin Ahorn-trø. – Av bulmiklastu plantaðu Ahorn trøum í landinum.

Mælt verður avgjørt til, at hesi verða varveitt.

Trøini eru staðsett millum gomlu sýslumanshúsini (hjá Kemma) og Gomlu Politistøðina . Tiverri eru prýðiligu húsini hjá Kemma niðurtikin tíðliga í 1980 unum.







*Gomlu sýslumanshúsini – bygd í 1860unum.*
*(myndin til vinstru frá FB-bólkinum"Gamlar myndir í Norðoyggjum)*
*(myndin til høgru: frá bóklingin: Klaksvík 1908-1968*)

# Kapitul 3

## Býarrúm – serstakar byggisamtyktir - uppskot

**UP 27 Síðugøta eysturúr Vágsheygsgøta**

Húsini framvið gøtuni hava ikki varðveitt uppruna skap, men, mælir bólkurin til, at friðarliga síðugøtan ella túnið úr Vágsheygsgøtu við gomlu -partvís privatu - gongugøtuni oman í Vág, verður viðfarin varliga og varðveitt sum býarrúm .



**UP 28 Fríøki á Vágsheygnum**

Bygging og fríøki í góðum samljóði. Bólkurin mælir til, at møguleikin fyri at varðveita fríøkið verður kannaður.

Myndin vísir Fossagøtu og norðureftir . Vælvaksna ahorntræið í miðjuni er helst 30-40 ára gamalt.



**UP 29 Øki við toftum og bøgarður**

**Serstøk byggisamtykt**

Mælt verður til, at eitt belti uppá uml. 20 metrar, frá húsunum hjá Sámal hjá Barbu og út til og við tann bakaða bøgarðin, verður varðveitt við serstakari byggisamtykt - hetta grundað á eldri og nýggjari toftir í økinum. Somuleiðis eigur allur garðurin at verða varðveittur.



**UP 30 Framvið Uppsalagøtu**

Byggingin framvið Uppsalagøtu umboðar ymisk byggisnið, og høgu trøini skapa lívd og hugna. Bólkurin mælir til, at krav verður sett um, at ný- um- ella útbyggingar skulu harmonera við umhvørvið og tess søgu.







Elstu húsini í grannalagnum



Trappusteinurin í Køkinum á Uppsølum er varðveittur

**VÁ 45 Húsini hjá Eskild Steensen** (32)

Her stóðu fyrstu sethúsini á Selheyggi, bygd í 1875. Kommunan keypti húsini, og nøkur ár seinni blivu tey tikin niður, og økið gjørt til parkeringspláss. Mælt verður til at fríðka garðin – helst við laðaðum gróti, hetta fyri at afturvinna upprunadámin av økinum. – Í verandi líki sær økið kalt út og er ikki serliga vakurt.



**VÁ 46 Umhvørvið í Vágstúni:**

**Serstøk Byggisamtykt**

Umhvørvið er homogent og harmoniskt og umboðar ávís byggitíðarskeið í Klaksvík. Tykist tó heldur berligt - so gott sum ongin trævøkstur.

Fyri at varðveita dynamiska umhvørvið og homogenitetin, mælir bólkurin til, at gjørd verður serstøk byggisamtykt fyri økið, sum ikki niðurbindur arkitekturin, men loyvir variatiónum innan ásetta hædd og vav við tí endamáli at tryggja, at nýbygging hóskar til umhvørvið.





**VÁ 47 Vestanfyri Kirkjubrekku**

Ognirnar hava stórar møguleikar. – Rætt umsitið kann økið gerast ein perla mitt í býnum – ikki minst um marknagarðarnir verða minni ásýniligir og urtagarðarnir sostatt meira integreraðir við almenna rúmið. - At opna innilokaðu Vágsánna, hevði givið økinum enn eina spennandi dimensión.





**VÁ 48 Sandstrondin niðanfyri Seglhúsið**



Verður brúgvin gjørd í stand og útfyllingin við Kiosk Vár tillagað við einari náttúrligari samanbinding í fjøruna sunnanfyri, verður úrslitið eitt fjálgt og hugnaligt býarrúm, har nútíð og søga møtast í samljóði. Mælt verður til, at økið verður dagført og varðveitt.

**VÁ 49 Býarrúm suðurúr Kommunubrekku**

**Serstøk Byggisamtykt**



Talan er her um ein arbeiðarabýling frá Klaksvíkshandilstíðini. Fleiri av húsunum er forfallin og útbyggingar og broytingar av teimum flestu húsunum tykjast tilvildarlig. Bólkurin heldur tó, at økið er áhugavert og avspeglar tíðina, tað var bygt, men hevði verið munandi meiri áhugavert og fjálgt við plantum, trøum og betri viðlíkahaldi. – Mælt verður til, at uppskot um serstaka byggisamtykt verður útarbeidd fyri økið, har lagt verður upp til ymiskar húsalitir og grønar blettir.

**VÁ 50 Býarrúm Lávíkabrekka**



Umhvørvið hevur ein serstakan dám. Mælt verður til, at møguligar broytingar í økinum verða framdar við virðing fyri tí verandi.

**<u>VÁ 51   Víkavegur</u>**

Bólkinum dámar væl “bakkuta” Víkavegin, við dámi av eldri vegagerðarhátti, áðrenn nútíðar “beinlinjaða” vegagerðarháttin.



**<u>VÁ 52   Rekreativt øki í Klaksvíksgarðinum</u>**

**Uppskot**

Bólkurin mælir til, at funnið verður annað pláss til pylsuvognin sunnanfyri Fornminnasavnið. – Ein møguleiki er at flyta hann omanum Faktorsveg, við pisshúsið. Samstundis hevði verið áhugavert at rekonstruera 8-kantaðu kai-kioskina í sama øki.



*"Gamlar myndir úr Norðoyggjum" FB á alnetinum*



**<u>Grannalag til friðaða bygging</u>**

Mælt verður staðiliga til, at nýbygging uppat gomlum friðaðum bygningum tekur atlit til dámin á økinum, soleiðis at hesin verður órógvaður minst møguligt.

**GE 12 Tey gomlu húsini í Gerðum** FM nr. 8405 (70)

**Serstøk Byggisamtykt**

Fyri sum best at tryggja upprunadámin av økinum, mælir bólkurin til, at serstøk byggisamtykt verður gjørd fyri økið sum skjótast. (sí síðu 27)



**MY 21 Gongugøta millum vegir**

Bólkurin fegnast um smáu sniðgøturnar, sum binda saman størru vegirnar og stytta um leiðina fyri tey gangandi.
Mælt verður til at fjølga og fjálga um hesar gøtar .



## Uppbýti av økjum:

**UP:**Uppsalir
**VÁ:** Vág
**GE**: Gerðar
**MY:**Myrkjanoyri
**NO:** Norðoyri
**ST:** Strond
**SK:** Skálatoftir
**ÁR:** Árnafjørður




*FDS - kort*

## Keldur og frásøgufólk:

Víst verður til hesar keldur, ið nevndin frá 1987 hevur brúkt undir arbeiðinum

Bókmentir:

Staðanavnalisti Føroya Løgtings, savnað Hans Biskupstøð
Fornminnalistin hjá Føroya Fornminnissavni
Chr. Matras: Stednavne på der færøske norðuroyar, 1932
Andreas Weihe: Tjóðminni, 1938
Daniel Bruun: Fra de færøske bygder, 1929
Robert Joensen: Klaksvíkar bygd í søgu, 1942
Robert Joensen: Greivabitin, 1960
Robert Joensen: Forn føroysk boðsending, 1981
J. Símun Hansen: Havið og vit II, 1966
J. Símun Hansen: Tey byggja land I, 1971
J. Símun Hansen: Tey byggja land VI, 1980
J. Símun Hansen: Tey byggja land VII, 1981
J. Símun Hansen: Nýbýlingar í Klaksvík í 19. Øld, 1954
J. C. Svabo: Indberetninger fra ein reise i Færøe 1781 og 1782
V. U. Hammershaimb: Meddelelser fra en rejse på Færøerne i 1847-48
Føroya Fólkaháskúli 1899-1949
Hugnalig jól 1973
Jógvan Ravnsfjall: Sólarmerki í Norðoyggjum. Fólkaleikur. 2005
Hans Andrias Sólvará: Klaksvíkar Søga I-II. 2008-2009
Leikar í Lund. 2008-2010
Grevstrarfrágreiðingar:
    Niðri í Toftum 1969-1973
    Niðri í Toftum 1989-1990
    Niðri í Toftum 2001-2002
    Bønhústoftin 1986
    Útgrevstur í samband við tunnilsvegin 2003
Fornminnaskrásetingin runt Borðoyarvík 2005-2006
FDS kort
Kortal.fo

--

Frásøgufólk (í samband við 1987-útgávuna):

Jens Pauli Joensen, Klaksvík
Frodor Joensen, Klaksvík
Sámal J. Høgnesen, Oyri
Jákup Matras, Oyri
S. Michael Matras, Oyri
Robert Joensen, Klaksvík
Jógvan Martin Joensen, Klaksvík
Óli Joensen, Klaksvík
Nicolai Poulsen, Árnafirði
Julius Steffensen, Árnafirði

-

Myndir:

Allar myndir, sum ikki eru frámerktar við keldu, eru avmyndaðar á kanningartúrum av Gunnleyg Kallsberg Dánjalsson.